Fíggjarmálaráðið

Løgtingið

Dagfesting:	29.09.2020
Mál nr.:	20/00439
Málsviðgjørt:	BAB
Eftirkannað:	21.09.2020

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild, svartkjafti og botnfiski í 2018, 2019 og 2020 og botnfiski í Barentshavinum í 2020 (Leingjan av heimild at taka veiðigjald)

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild, svartkjafti og botnfiski í 2018, 2019 og 2020 og botnfiski í Barentshavinum í 2020
(Leingjan av heimild at taka veiðigjald)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 172 frá 20. desember 2017 um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild, svartkjafti og botnfiski í 2018, 2019 og 2020 og botnfiski í Barentshavinum í 2020, sum broytt við løgtingslóg nr. 179 frá 21. desember 2018, løgtingslóg nr. 149 frá 13. desember 2019, løgtingslóg nr. 171 frá 31. desember 2019 og í § 75 løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:

"**Løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild, svartkjafti og botnfiski í 2018, 2019, 2020 og 2021**"

2. § 1, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Rættindahavari, sum veiðir av rættindum, Føroyar ráða yvir, skal rinda eitt veiðigjald, sum verður lagt á hvørt fiskað kilo í rundari vekt av makreli, norðhavssild og svartkjafti, sum fiskifarið fiskar við fiskiloyvi til makrel, norðhavssild ella svartkjaft í 2018, 2019, 2020 og 2021 og fyri hvørt kilo í rundari vekt av botnfiski, sum fiskifarið fiskar við fiskiloyvi til botnfisk í russiskum sjógvi í Barentshavinum, botnfiski í norskum sjógvi norðan fyri 62°N og botnfiski við Svalbard í 2020 og 2021, tó undantiknar kvotur, sum eru keyptar á uppboðssølu."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2021.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsøk til uppskotið
1.2.
Uppskotið verður lagt fram av fíggjarlógar-tekniskum orsøkum.

Løgtingslóg um landsins játtanarskipan ásetur, at lógaruppskot um neyðuga fylgilóggávu verður lagt fram og samtykt í seinasta lagi samstundis, sum játtanaruppskot verður lagt fram og samtykt.

Fyri at fylgja hesum setningi verður uppskot um dagføring av serstakum treytum fyri fiskiskap lagt fram nú við sama innihaldi, sum galdandi lóg um serstakar treytir fyri fiskiskap fyri 2020.

Í samgonguskjalinum er ásett, at tilfeingisgjaldið verður eitt yvirskotsgrundað gjald, sum tekur hædd fyri rentu-, olju og fiskaprísi. Lógaruppskot um dagført tilfeingisgjald verður ætlandi lagt fram áðrenn árslok.

1.2. Galdandi lóggáva
Galdandi lóg ásetur veiðigjøld fyri 2018, 2019 og 2020 fyri makrel, svartkjaft, norðhavssild og botnfisk í Barentshavinum

1.3. Endamálið við uppskotinum
Uppskotið verður lagt fram av fíggjarlógar-tekniskum orsøkum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við uppskotinum verður sama kilogjald rindað í 2021.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Vegna tíðartrýst hevur uppskotið ikki verið til hoyringar.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið verður lagt fram av fíggjarlógar-tekniskum orsøkum. Kvotur eru ikki ásettar fyri 2021 og tí ber ikki til at siga neyvt hvat inntøkan verður í 2021. Mett verður, at inntøkan í 2021 verður á sama støði sum í 2020.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Umsitingin hjá Vørn verður mett at verða tann sama sum fyri 2020.

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur negativar fíggjarligar avleiðingar fyri partar av vinnuni, sum verður áløgd veiðigjald fyri hvørt fiskað kilo í rundari vekt av makreli, norðhavssild, svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum í 2021.

Í mun til galdandi lóggávu verður ikki mett, at uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Mett verður ikki, at tað eru bindingar í millumtjóðasáttmálum, sum gera, at uppskotið fær fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar fyri landsmyndugleikar, kommunumyndugleikar, ávís øki í landinum, ávísar samfelagsbólkar ella vinnuna.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður ikki, at uppskotið er í ósamsvari við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, harundir Evropeiska mannarættindasáttmálan ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Mett verður ikki, at uppskotið hevur markaforðingar við sær.

2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv
Hetta broytingaruppskot hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið ásetur veiðigjald, sum skal rindast av teimum eigarum av fiskiførum undir føroyskum flaggi, ið fiska makrel, norðhavssild og svartkjaft í 2018, 2019, 2020 og 2021 og botnfisk í Barentshavinum í 2020 og 2021. Við uppskotinum verður veiðigjaldið í 2021 kr. 1,50 fyri hvørt fiskað kilo av makreli, kr. 0,60 fyri hvørt fiskað kilo av norðhavssild, kr. 0,25 fyri hvørt fiskað kilo av svartkjafti og 0,50 kr. fyri hvørt fiskað kilo av botnfiski.

Heimaflotin er undantikin veiðigjaldinum eins og undanfarin ár.

2.12. Gjøld
Uppskotið leggur ikki gjøld á nakrar tænastur.

2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á fólk.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til annan landsstýrismann, stovn ella kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum
Veiðigjøld verða framhaldandi áløgd makrel, svartkjaft, norðhavssild og botnfisk.

Yvirlit.

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til nr. 1
Heitið á lógini verður broytt soleiðis, at 2021 eisini verður nevnt.

Til nr. 2.
Ásett verður, at veiðigjøldini verða galdandi í 2021.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið 29. september 2020

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur